

## Brückner ikki venjari hjá Eysturríki longur

Vánaligu úrslitini hjá Eysturríki – eitt nú javnleikurin ímóti Føroyum – hava nú ført til, at 69 ára gamli tjekkin, Karel Brückner, ikki longur er landliðsvenjari hjá Eysturríki. Fýra teir fyrstu dystirnir hjá í HM-undankappingini hava bert givið fýra stig, og tí eru eysturríkska fótbóltssambandið og Brückner komin ásamt um at steðga samstarvinum, sum vardi í sjey mánaðir.

## Villur rennitúrur í Suðuroy í apríl

Í døgunum frá 3. til 5. apríl verður skipað fyri einum serligum rennitúri runt Suðuroynna. Runnið verður úr Sumba til Sandvíkar, og á ferðini norður gjøgnum oynna verða eisini boðið til ymisk tiltøk. VILT de Suðuroy, sum rennitúrurin kallast, byrjar í Sumba fríggjakvøld, og endar í Sandvík sunnudag. Teinurin er 53 kilometrar, og runnið verður í fýra umførum. Á leiðini norður gjøgnum oynna verður skipað fyri ymsum øðrum tiltøkum, so sum útferð, bowling, undirhaldi og øðrum.

teinin leygardagin, og tá visti hon, at hon fór at fáa mótstøðu, tí hon kendi mótstøðukvinnuna.

– Ætlanin hjá mær var at vinna á henni, men tað gekk so ikki. Men sunnudagin, tá eg rann 1.500 metrar, var mótstøðan ikki serliga stór, tí tá var eg heili 15 sekund framman fyri hana, sum bleiv nummar tvey.

Umframt tey bæði, so eydnaðist eisini tveimum av hinum rennarunum at fáa heiðursmerki. Leygardagin vann Rebekka Fuglø silvur á 800 metra teininum, og sunnudagin eydnaðist Jóan Karl Joensen at vinna bronsu á 1.500 metrum, so samlaði heiðursmerkjafongurin frá ferðini gjørdist tvey gull-, tvey silvur- og tvey bronsumerki.

### Var send heimaftur

Hóast Rúni er tvey ár yngri enn Bjørk, hevur hann runnið í tvey ár meira, tí hann var ikki meira enn átta ára gamal, tá hann fyri fyrstu ferð var við í árligu Flaggdagsrenningini í Havn.

– Eg vann ikki nakað beinanvegin, men á Norðoyastevnu vann eg mína fyrstu kapping, og so ivaðist eg ikki í, at eg skuldi halda fram. Tað bleiv stuttligari, tá eg byrjaði at vinna, og síðani havi eg runnið øll árini, sigur hann.

Hjá Bjørk var tilgongdin til renningina eitt sindur øðrvísi, tí hennara fyrstu royndir fekk hon ikki frá kappingum, men tí hon vildi vera uppií, tá pápi hennara, Jósvein Herup Olsen, vandi eitt sindur av motiónsrenning.

– Eg vildi altíð sleppa við honum at renna, men av tí at eg í fyrstuni var ov lítil, so mátti hann senda meg heimaftur fleiri ferðir, tá eg bara var farin rennandi aftan á honum, sigur hon flennandi.

– Men eg vildi renna, og til ta fyrstu Flaggdagsrenningina gjørdist eg nummar trý. Tað var ordiliga stuttligt, og so byrjaði eg eisini at fara til stevnurnar og fekk góð úrslit, og síðani havi eg hildið fram við renningini alla tíðina.

### Mugu venja nógv

Tá tað liggur so væl fyri, sum hjá teimum báðum, ið nú eru danskir innandura meistarar og eisini hava verið danskir meistarar í øðrum kappingum fyrr, krevst sjálvandi nógv og miðvís venjing.

– Eg renni í øllum førum fimm ferðir um vikuna, og so havi eg sjálvandi eisini alternativa venjing, so sum súkkling ella svimjing, umframt at eg eisini geri styrkivenjingar, sigur Bjørk.

– Nógva av venjingini er á Tórsbreyt, men eg renni eisini á vegnum, í viðarlundini og aðrastaðni. Men intervallvenjingin er øll á Tórsbreyt.

Renningin hjá Rúna minnir nokk so nógv um ta hjá Bjørk, men tá bæði nevna intervallvenjingina, noyðist blaðmaðurin at biðja tey greiða eitt sindur nærri frá, hvat tað merkir.

– Tað er tann harða venjingin, sum gevur úrslit, sigur Rúni, og so kemur Bjørk við einari enn greiðari frágreiðing:

– Í staðin fyri at renna ein heilan túr upp á til dømis tríggjar kilometrar, so deilir tú hann upp í petti, so tú rennur 500 metrar, alt hvat tú orkar. So steðgar tú á eina løtu og rennur so aftur 500 metrar, fyri at fáa ferð á.

### Helst bæði til Álands

Í summar eru aftur Oyggjaleikir á skránni, og longu nú er greitt, at Bjørk Herup Olsen í øllum førum verður við í tveimum kappingum. Hon skal renna 1.500 og 5.000 metrar, men ikki 3.000 metrar, tí tann teinurin er ikki við á leikunum.

Hjá Rúna Seloy er støðan tann, at hann við sínum 15 árum er nóg gamal at fara til Oyggjaleikirnar, men enn hevur hann ikki klárað tær kravtíðir, sum eru.

– Men eg vóni, at eg klári tær, sjálvt um eg kanska kann sleppa við allíkavæl, tí eg kann fáa undantaksloyvi, tí eg eri so ungur, sigur hann.

– Eg gera tó alt fyri at sleppa við upp á mínar tíðir, og har restar ikki so nógv í. Á 400 metra teininum eri eg tvey sekund frá kravtíðini, og eg eri fimm sekund frá kravtíðini á 800 metrum. Og sjálvt um eg fái undantaksloyvi at fara við, er málið hjá mær at fáa tíðirnar so langt niður sum gjørligt.

# Útlendingar fara heimaftur

**Teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár fór sjey fótbóltsspælarar úr føroyskum fótbólti og til útlendsk feløg. Burtur sæð frá Oddmar Færø, er talan um útlendskar spælarar, ið fara heimaftur**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nógv bendir á, at útlendsku fótbóltsspælararnir í ár ikki verða so nógvir í tali í føroyskum fótbólti, sum teir hava verið tað undanfarnu árini.

Henda ábending sæst eisini aftur í yvirlitinum yvir spælaraflytingar teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár, sum Fótbóltssambandið kunngjørdi í gjár, tí har er talan um seks útlendingar, sum eru farnir heimaftur, eftir at teir hava spælt í Føroyum.

Nýggja felagið í Vodafonedeildini, 07 Vestur, eigur tríggjar av teimum, sum eru pólendingurin Andrzej Stretowics, serbin Jovan Radinovic-Panic og brasilianarin Heron Charles Anchieta da Silva, sum allir fara aftur til heimlond síni at halda fram við fótbóltinum.

Tveir av serbunum, sum hava spælt við NSÍ, Aco Pandurovic og Dejan Stojkovic, eru farnir aftur til heimlandið, og tað sama er danskarin hjá greipuvinnarunum úr EB/Streymi, Anders Post Jacobsen, sum nú spælir við FC Hjørring.

Einasti føroyingurin av teimum sjey, sum eru farnir úr føroyskum feløgum fyrstu tveir mánaðirnar, er 19 ára gamli Oddmar Færø, sum fyri einum mánaði síðani skifti frá B36 til danska Brøndby, har hann í øllum førum verður næstu fýra mánaðirnar, til hetta kappingarárið er av.



*Aco Pandurovic og fimm aðrir útlendingar hava síðstu tveir mánaðirnar sagt føroyskum fótbólti farvæl*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Heini besti málskjútti

**Hóast Ajax tapti botnuppgerðina ímóti TMS Ringsted sunnudagin, lá parturin hjá Heina Hanusarson ikki eftir, tí við fimm málum gjørdist hann toppskjútti á liðnum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*




*Við fimm málum var Heini Hanusarson sunnudagin besti málskjútti hjá Ajax, sum tó tapti í botnuppgerðini ímóti TMS Ringsted*

Nóg illa vóru tíðindini borin um, at Hondbóltssambandið hevði strikað allar karantenur í sambandi við Bosnia-túrin hjá landsliðnum, so vísti Heini Hanusarson á vøllinum, at honum kann í øllum førum roknast við, um boð verða eftir honum.

Sunnudagin spældu Hanus og liðfelagarnir í Ajax ein sera týdningarmiklan dyst ímóti botnliðnum TMS Ringsted, men dysturin var taptur, so Ajax nú hevur býtt um pláss við TMS Ringsted og er aftast í bestu donsku hondbóltsdeildini.

At byrja við fylgdust liðini, men so fekk TMS Ringsted vunnið seg upp á 7-4. Hanus og teir fingu tó svarað aftur og komið upp á 7-7, men so var eisini liðugt, tí TMS Ringsted fór avstað og endaði við at vinna dystin 28-25.

Innanhýsis er Ajax framvegis eitt mál betri, men tað hjálpir fyribils so lítið, tí TMS Ringsted hevur seks stig og Ajax á aftasta plássi fimm. Næsti dystur hjá Ajax er ímóti GOG, sum er fjórðniðast.

Men á einum degi, har lítið annars gekk eftir vild hjá liðnum, eydnaðist tó Heina Hanusarson at gerast besti málskjútti hjá Ajax við fimm málum, og harvið fekk hann eisini gjørt vart við seg, nú landsliðsdyrnar aftur eru opnar og bara tvær vikur eru til næstu uppgávuna.

Mikudagin 18. mars spæla Føroyar í EM-undankappingini á heimavølli ímóti Sveis, og tríggjar dagar seinni møtast liðini aftur, hesa ferð í Sveis.